

# Samkomublaðið fyri oktober 2017

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar









www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið

## Okkum tørvar nærveruna



Rúni Rasmussen

*Stórleiki og dýrd eru fyri ásjón Hansara, styrki og gleði eru, har sum Hann er. (1. Krøn. 16,27)*

Tað er serliga eitt, sum vit eftir mínum tykki eiga at hava nógv meiri ímillum okkum, og tað er nærvera Guds. Gud vil ikki bara vitja okkum av og á, men Hann vil vera nær hjá fólki Sínum. Hann er nær hjá okkum, tá ið vit bjóða Honum vælkomnum og geva Honum rúmd. Nærveran verður veruleiki, tá ið vit sum einstaklingar seta okkum fyri at hava djúpari samfelag við Hann. Eitt inniligt og erligt samfelag við Gud í Heilaga Andanum. Latið okkum raðfesta tað týdningarmesta í lívinum: okkara samfelag við Gud. Hann, sum hevur skapt okkum, sum elskar okkum, sum hevur frelst okkum og sum hevur dreymar fyri okkara lívi. Hann ynskir, at vit skulu eydnast í fult mát.

Vit hava brúk fyri Guds nærveru, at Guds ríki og Hansara virði koma til sjóndar. Tað eru virðini, ið eru í hesum kongaríki, t.d. rættvísi, friður og gleði, heilagleiki og kærleiki. Tað er so, at tað er nærvera ella Guds hjarta, ið hitar hjartað, ið er kalt ella fløtt. Einki annað menniskja fær skrúvað andaliga hitan hjá tær upp. Tað kann bara Gud gera við Sínum Heilaga Anda. Tað er bert Gud, sum kann gera okkum meira brennandi. Vit kunnu eggja hvønn annan og hjálpa hvør øðrum, men tað er Gud, sum tendrar ein eld í hjørtum okkara við Sínum Anda. Og hann má sleppa tað – hann má sleppa at fáa fatur í okkara hjørtum. Tað kalda hjartað verður heitt av Hansara heita hjarta.
Kom til Hann sum tú ert! Verð sannur! Slepp øllum undanførslum, og lat ei mannaóttan køva, men sig: Gud her eri eg, broyt mítt hjarta! Eg vil hava eitt hjarta sum brennur, eitt hjarta sum er heitt, eitt hjarta sum slær í takt við títt hjarta, Gud!

Hvat gleðir Guds hjarta? Hjørtu sum eru brennandi, sum hava eldhuga fyri Hansara ríki, og liva fult og heilt fyri Hann í fylling og leiðslu Heilaga Andans. Tað er her vit fáa styrki.
Tað er her, vit fáa vísdóm. Tað er her, vit verða myndað til at líkjast Jesusi meir og meir. Tað er lívið í Hansara nærveru, ið er okkara grundarlag fyri at kunna fara út og broyta heimin.
Tað er Guds nærvera, sum ger munin í okkara lívi, á okkara arbeiðsplássum, í okkara skúlum og í samfelagnum sum heild.

# Skrá fyri oktober

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 25. sep. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 26. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 30. sept | kl. 20.00: | AWAKE við Honnu Poulsen |
| Sunnudagur | 1. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum<br>Sangframførsla við Odu á Fríðufløtum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 2. okt. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 3. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| | | kl. 19.00: | Junior |
| Hósdagur | 5. okt. | kl. 10.30-13.00: | Mammucafé |
| Leygardagur | 7. okt. | kl. 20.00 | AWAKE við Benjamin Jacobsen |
| Sunnudagur<br>: | 8. okt. | kl. 11.00 | Missiónsmøti við Búgva Olsen.<br>Døgurði. Tilmelding krevst. |
| | | kl. 20.00: | Konsert |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 9. okt. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 10. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 14. okt. | kl. 20.00: | AWAKE við Euroclass |
| Sunnudagur | 15. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku<br>Sangframførsla við Miriam Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 16. okt. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 17. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 19. okt. | kl.10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 21. okt. | kl. 20.00: | AWAKE við Paula Høj |
| Sunnudagur | 22. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Rúna Rasmussen<br>Sangframførsla við Terja B. Vestergaard |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 23. okt. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 24. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 21. sept. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 28. okt. | kl. 20.00: | AWAKE við Dánjal Petersen |
| Sunnudagur | 29. okt. | kl. 11.00: | Familjumøti |

# Lýsingar

**Legur**

Fleiri legur verða hildnar í Kelduni í heyst. Ungdómslega verður 13.-15. oktober. Hjúnabandslega verður 27.-29. oktober. Manslega verður 10.-12. november. Kunnað verður nærri um legurnar á Facebook og keldan.fo. Um hjúnabandsleguna: Tilmeldingin, sum fer fram á heimasíðuni hjá Kelduni frá sunnukvøldinum 22. september, kl. 18:00. Møguleiki er fyri at gista í Kelduni ella heima. Tey, sum eru fyrst at tekna seg, hava møguleika at velja at gista í Kelduni. Sí annars nærri kunning á heimasíðuni.

**Matstovan**

Matstovan er opin mikudagar kl. 17-21. Fylg við á Facebook.







## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584